Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 17. september 2004

**COUNTRY DANSUR**

Rimmar Country dansur við Ragnar í Vík og vinmonnum, Counrtybólkinum úr Klaksvík og Twilight verður í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið 25. september.



STUÐLAFELAGIÐ HJÁ ARGJA BÓLTFELAG



**Solaris** CANAL+

Endurupptøka av klassisku skaldsøguni eftir Stanislav Lem. Leikstjórnað hevur Oscar-virðisløнti Steven Søderbergh. Gátuførir tilburðir fara fram á eini rúmdarstøð, har ein sálarfrøðingur er boðsendur. Fyri tey ferðandi umborð á rúmdarstøðini sýnist markið millum dreymaheimin og veruleika so líðandi at hvørva. Framtíðarfilmur frá 2002.

**Hósdag 23. kl. 22.00**



**2001: A Space Odyssey** KANAL 5

Mannaættin fer fyri fyrstu ferð út har sum einki menniskja fyrr hevur verið – út í rúmdina. Dr. Heywood Floyd verður sendur út á mánan, har vísindamenn hava funnið ein gátufulla svarta steinsúlu. Virðisløntur framtíðarspenningsfilmur leikstjórnaður av Stanley Kubrick.

**Leygardag 18. kl. 01.00**



**Temakvøld: Cohen og Danmark**

21. septembur fyllir Leonard Cohen 70 ár og Dr2 fagnar tí kanadiska sangaranum, sangskrivaranum og yrkjarinum við einum temakvøldi. Á skránni er m.a. ein dokumentarfilmur, ið snýr seg um yrkjaran Cohen, áðrenn hann byrjaði at syngja. Heita á hesum dokumentarfilminum frá 1965 er "Ladies and Gentlemen, Mr. Leonard Cohen".

**Mánadag 20. kl. 19.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**